




**Wilhelm Petersen**

*Okkara øl hevur nú verið til keyps í eitt vikuskifti.*

**Hvussu hevur móttøkan verið?**
- Hon hevur verið sera góð. Vit hava selt í øllum deildunum hjá Rúsuni, og vit hava longu fingið fleiri bíleggingar aftur, so tað má sigast at hava gingið væl við søluni. So vit mugu koyra meiri útaftur í sølubúðirnar nú fyrst í vikuni.

**Hava tit fingið nakrar afturmeldingar?**
- Ja, bæði bløð og Grams hava havt vurderingar av Okkara, og har kann eg bara staðfesta, at tað bara hava verið positivar afturmeldingar. Og frá fólki á gøtuni hava vit eisini fingið sera góðar viðmerkingar, deils at teimum dámar væl sniðið og at ølið er í dós, og so eisini, at teimum dámar væl innihaldið. Tað er so eitt sindur ymiskt hvat slag, fólki dámar best.

**Hvørja øl dámar tær best?**
- Mær dámar best gullina. Hon smakkar nógv. Men eg haldi, at tær allar tríggjar eru góðar.

# Besta sveinaroyndin

**PRÓGV** Atli Henriksen úr Klaksvík fekk allar besta úrslit, tá ið hann herfyri tók sveinaprógv á einum donskum skúla



*Atli Henriksen (t.v.) saman við Søren Jensen, sum hann gjørdi sproytivognin saman við*



*Atli gjørdi tann skínandi kølaran til høgru*

Randi Jacobsen

Atli Henriksen í Klaksvík er nú avlærdur sum rustfríur kleynsmiðjur. Lærítíðin á Blikksmiðjuni Klaksvík var úti fríggjadagin.

Hann gjørdi tað bragd, tá ið hann tók sveinaprógv á tekniska skúlanum í Kolding í Danmark, at hann fekk allarbesta útslitið. Hann fekk 10 eftir 12-stiganum, og tað verður mett at vera sera gott. Atli Henriksen hevur fingið at vita, at dómarnir eru ymiskir, og at teir, sum mettu hesa ferð, vóru tríggir av teimum strongu.

Sveinastykkið varð gjørt yvir fimm vikur.

- Eg gjørdi sjálvur ein sjampanjukølara, og saman við einum donskum næmingi gjørdi eg ein mini vogn, at sproyta tøð út við, sigur Atli Henriksen.

Fyribils heldur hann fram at arbeiða á Blikksmiðjuni í Klaksvík, men ætlan hansara er at fara víðari og læra til maskinmeistara. Tað verður antin í januar ella august næsta ár.

randi@sosialurin.fo

## Í MORGIN

**5/ 10 °C**



19-24 m/s — 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið ella storm av landsynningi og regn. Hitin millum 9 og 12 stig.

## MIKUDAGIN

**8/ 12 °C**



11-16 m/s — 18-23 m/s

Skrið ella stormur av landsynningi og suðri og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 11 og 14 stig.

## HÓSDAGIN

**8 / 12 °C**



7-12 m/s — 12-17 m/s

Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, seinnapartin fríggjadagin og leygardagin minni vindur. Sólglottar, men eisini okkuret ælið. Hitin millum 10 og 14 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 995 hPa. skamt eystan fyri Førtoyar hvørvur í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið yvir Atlantshavinum kemur hendavegin og dýpist nógv. Tað verður væntandi við Føroyar týskvøldið.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

**Hitalagið kring knøttin**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 1. juli | Mánin longst frá jørðini |
| 4. juli | Seinna kvarter |
| 6. juli | Jørðin longst frá sólini |
| 11. juli | Tendring |
| 13. juli | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. juli | 01:50 | 14:23 | 00:50 | 13:23 | 01:05 | 13:38 | 03:50 | 16:23 | 04:50 | 17:23 | 00:05 | 12:38 | 11:38 | 23:58 | 02:05 | 14:38 | 03:05 | 15:38 | 01:35 | 14:08 | 02:50 | 15:23 |
| 6. juli | 02:43 | 15:03 | 01:43 | 14:03 | 01:58 | 14:18 | 04:43 | 17:03 | 05:43 | 18:03 | 00:58 | 13:18 | - | 12:18 | 02:58 | 15:18 | 03:58 | 16:18 | 02:28 | 14:48 | 03:43 | 16:03 |
| 7. juli | 03:25 | 15:47 | 02:25 | 14:47 | 02:40 | 15:02 | 05:25 | 17:47 | 06:25 | 18:47 | 01:40 | 14:02 | 00:40 | 13:02 | 03:40 | 16:02 | 04:40 | 17:02 | 03:10 | 15:32 | 04:25 | 16:47 |
| 8. juli | 04:11 | 16:36 | 03:11 | 15:36 | 03:26 | 15:51 | 06:11 | 18:36 | 07:11 | 19:36 | 02:26 | 14:51 | 01:26 | 13:51 | 04:26 | 16:51 | 05:26 | 17:51 | 03:56 | 16:21 | 05:11 | 17:36 |
| 9. juli | 05:02 | 17:28 | 04:02 | 16:28 | 04:17 | 16:43 | 07:02 | 19:28 | 08:02 | 20:28 | 03:17 | 15:43 | 02:17 | 14:43 | 05:17 | 17:43 | 06:17 | 18:43 | 04:47 | 17:13 | 06:02 | 18:28 |